SP/F GRANNSKOÐARAFELAGIÐ
RASMUSSEN & WEIHE

## Bókhald

Fyri ein av kundum okkara í Tórshavn søkja vit eftir einum fólki til bókhald og skrivstovuarbeiði.

Arbeiðið umfatar bókhald og annars alt vanligt skrivstovuarbeiði.

Bert eitt fólk starvast í bókhaldinum. Tann, ið setast skal í starvið, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, og praktiskar royndir og kunnleiki til bókhald eru tí ein treyt.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu í seinasta lagi 15. januar 2001 sendast til Rasmussen & Weihe P/F, sum eisini kann geva nærri upplýsingar um starvið.

RASMUSSEN & WEIHE
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018
Sp/f nr. 267
e-mail:
rasmussen @rasmussen.fo
Http://www.rasmussen.fo


VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Samskipari innan oljuvinnu

Føroya Arbeiðsgevarafelag søkir eftir starvsfólki til skrivstovuna at byrja skjótast gjørligt.

Arbeiðið fevnir um viðgerð av málum sum hava við oljuvinnu og fyrireiking av hesari nýggju vinnu at gera. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við stjóran og við nevndina í oljubólkinum.

Arbeiðið fevnir m.a. um
- at vera við til at tryggja og fremja føroyska vinnuluttøku í oljuvinnuni
- málsviðgerð/skrivarauppgávur fyri nevndina í oljubólkinum
- skipan og rakstur av einum veitaragrunni

Í hesum sambandi krevst samskifti við myndugleikar, oljufeløg, stóru útlendsku veitararnar og ikki minst tætt samskifti við føroyska vinnu.

Vit vænta, at tú
- hevur hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum. Dentur verður lagdur á hollan kunnleika til enskt á samráðingarstøði
- hevur hollan telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur kunnleika til oljuvinnuna og føroyska vinnu.
Vit kunnu lova tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv, í einum mennandi arbeiðsumhvørvi.
Lønin er eftir avtalu.

Skrivlig umsókn, merkt "Starv", eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. januar 2001.
Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til stjóran, Jan Mortensen, tlf. 31 18 64.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
Vinnuhúsið
Postsmoga 179, FO-110 Tórshavn

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 12 vinnufeløgum, og í løtuni starvast 5 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og við kunning sum kann geva politiska ávirkan. Feløgini taka sær m.a. av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.


## Nýggjar TANNPROTESUR
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
BERGUR
Á REYNATRØÐ
Børkuvegur, 620 Runavík
Tlf. 448480
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

BILLUTIR

ÚTVEGAST
TIL FLEST
ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

JUNIOR
BUSS TAXA
KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

Sosialurin
www.sosialurin.fo


## Dansifrøi



### Ársveitsla

**Ársveitslan verður í Hoydølum leygarkvøldið 20. januar 2001.**

Borðhaldið byrjar kl. 19.30.
Orkestur spælir til dans.

Atgongumerki, sum kosta 275 kr., fáast til keyps í Mótaskálanum í Dr. Jacobsensgøtu ella hjá nevndarlimunum.

**Avgjørt seinasta freist at keypa atgongumerki er mikudagin 17. januar.**

### Ársaðalfundur

Mint verður eisini á ársaðalfund felagsins, sum verður sunnudagin 28. januar 2001, kl. 15.00 á Hotel Hafnia.

Við dansikvøðu

NEVNDIN

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Streymoyar øki**

## Avloysarastarv

**á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki**

er leyst at søkja skjótast gjørligt og til 30. juni 2001. Starvið umfatar tollarbeiði á posttolldeildini og annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarar við kunnleika til toll- og vøruskránna hava fyrimun.

Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir saman við prógvum o.ø. verða at senda til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Postboks 3139, 110 Tórshavn í seinasta lagi tann 22. januar 2001.


Sosialurin -har tað hendir




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1008, **P/F Vestlax, 350 Vestmanna.**

**Viðtøkur broyttar:** 11.09.2000.
**Nevnd:**
Farin frá sum formaður: Suni Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn
Innkomin sum formaður: Jógvan Ziska Djurhuus, Peter Andersensvej 1, DK-9850 Hirtshals.
Farin úr nevndini: Eyðbjørg Durhuus, Traðarvegur 19, 100 Tórshavn og Ida Berg,
Innkomin í nevndina: Bjarte Tunholt, 7 Oak Court Waydon Hill Road GU 98 Fanham UK og Gudmund Strømnes, N-6900 Florø.
**Stjórn:**
Innkomnir sum stjórar: Niels Dann West, Smærugøta 33, 100 Tórshavn og Frímund Hansen, Spógvavegur 39, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra saman við einum nevndarlimi, ella av einum nevndarlimi.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka aling, eiga partabrøv í øðrum feløgum, framleiðsla, handil og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. januar 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1044, **Sp/f Heri Thomsen, 512 Norðagøta.**

**Viðtøkur broyttar:** 21.07.2000.
**Nýtt navn:** P/F Heri Thomsen
**Nýtt hjánavn:** P/F H. T. Shipping (P/F Heri Thomsen)
**Nýggjur bústaður:** 510 Gøta
**Kapitalur:**
Hækking við kr. 170.000,00 til kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 170.000,00 til kurs 100.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum ella 2 nevndarlimum.

Skráseting Føroya tann 4. januar 2001

Kristin Balle


Bókhald
Roknskapur
Skattur

Tosið við okkum um hóskandi loysn til júst tygara tørv
Bókhaldsvirkið
Terji T. Dalsgaard
Tlf. 361376 - fax 361309
e-mail: sand-bok@post.olivant.fo

Vi vurderer å selge vår fileteringsmaskin for rødfisk

BAADER 151

Kørt kun 230 timer.

Kontakt: Tor Igesund på tlf. 47 700 80 700

**SUNNMØRSFISK A/S**
6090 Fosnavåg, Norge


## Aðalfundur

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya, verður í Norðurlandahúsinum, Tórshavn, leygardagin, 3. mars 2001, kl. 10.00.

Fundarskrá sambært lógunum.

**Fótbóltssamband Føroya**

Søkt verður eftir

## NÆMINGI

Til deildir okkara í Vágoy

*Vilt tú hava eina áhugaverda og fjølbroytta útbúgving?*

- Sum næmingur í Føroya Sparikassa fært tú júst eina tílíka innan peningastovns- og viðskiftafólkstænastu, somuleiðis sum tú skalt ganga í peningastovnsskúla.
  Næmingatíðin er 2 ár.

**Útbúgvingarkrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið HH-, students-, HT-, HF- ella tilsvarandi prógv.

**Umsóknin**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. januar 2001 kl.16.00

Er áhugi fyri fleiri upplýsingum, kanst tú seta teg í samband við Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, tlf. 348000.

Upplýsingar um virksemi hjá Føroya Sparikassa eru á heimasíðuni: www.sparikassin.fo

Hevur tú áhuga fyri hesum, ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við avriti av próvskjølum til:

**Føroya Sparikassi**
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn

## Ársaðalfundur

Føroya Astma/Allergifelag boðar við hesum frá at ársaðalfundur felagsins verður í MBF-Húsinum leygardagin 10/02/01, kl. 14.00.

Skrá sambært lógum felagsins. Grein 9 lógarbroyting, uppskot um lógarbroyting skulu vera nevndini í hendi 4 vikur áðrenn aðalfundin.

**Nevndin**


FARTELEFONIR
GSM - NMT 450
Tráðleysar telefonir o. a.
Ymisk merki, so sum:
MOTOROLA
ERICSSON NOKIA CONNECTING PEOPLE
SIEMENS BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045


## Endurlýsing eftir LEIÐARA til Dagstovnin í Kvívík

Vegna ov fáar umsóknir søkir Kvívíkar Kommuna av nýggjum eftir leiðara til Dagstovnin í Kvívík til setan 1. apríl 2001 ella eftir nærri avtalu. Starvið er fulltíðarstarv.

Undir Dagstovninum í Kvívík eru vøggustova til 10 børn, barnagarður til 20 børn, skúlaskipan til 10 børn og frá 1. januar 2001 eisini dagrøkt, har tað í løtuni eru 3 børn.

**Leiðarin**
Vit søknast eftir leiðara, sum:
- hevur útbúgving sum pedagogur
- hevur royndir á økinum
- á námsfrøðiligan hátt kann virka fyri at útinna lógarásettu uppgávuna hjá dagstovninum at menna, menta og hava umsorgan fyri børnunum í tryggum umhvørvi
- hevur hug og vilja at seta sín dám á endamálsorðingina fyri stovnin
- er opin fyri nýhugsan
- í samstarvi við bygdarráð og foreldur kann vera viðvirkandi til at fylla út karmarnar um ansingarskipanina í kommununi
- hevur góð samstarvsevnir

**Kommunan kann bjóða**
Eitt spennandi og avbjóðandi starv. Leiðarin verður við til at skapa karmarnar á ansingarøkinum, sum hevur stóran týdning fyri kommununa. Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Møguleiki er fyri, at starvsøkið kann verða víðkað /broytt innan fyri ásettu karmarnar í lógini.

Umsóknir saman við avriti av prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Kvívíkar Kommunu**
FO-340 Kvívík

og vera kommunuskrivstovuni í hendi seinast mánadagin 15. februar 2001.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til bygdarráðsformannin, Heina Holm, tlf. 421294 ella 210294.

**Føroya Pleygarafelag**

## Aðalfundur

Føroya Pleygarafelag hevur aðalfund tann 09. februar 2001.

Til viðgerðar er lógarbroyting.

**Nevndin**


## Handilsinnbúgv til sølu

Kølara, frystara, kassadiskur, hillar, ljósarmatur. o.a.

**Tlf. 214005**